sósialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Krisjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen - Jústinus L. Eldesgaard - Eyðun Klakkstein - Eirikur Lindenskov - Áki Bertholdsen

Útgevari, uppseting og prent: P/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 26 Argjum

Postadr. Postsmoga 76 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Internet: http://WWW.cybernet.dk/faroe-news e-mail: sosialur@olivant.fo

## Í posa og sekk

*Oddagrein*

FÓLKAFLOKKURIN fekk bæði í posa og sekk í hesi nýggju borgarligu-vinstrasamgonguni, samstundis sum Sambandsflokkurin er bukaður upp á plass fleiri ferðir.

TAÐ ljóðar næstan ótrúligt, at Fólkaflokkurin skal umsita bæði tey tungu málsøkini, sum figgjarmál og fiskivinnumál eru, samstundis sum Sambandsflokkurin skal taka til takka við vinnumenningarmálum.

HER hevði Sambandsflokkurin annars møguleika fyri at endurnýggja seg eitt lítið sindur og latið annan av landsstýrismonnunum, sum báðir eru oman fyri 60, víkja fyri nýggjum og yngri kreftum at umsita almanna- og heilsumál, sum eisini er eitt týðandi og stórt málsøki.

MEN Sambandsflokkurin hevur torført við at endurnýggja seg, samstundis sum hann er tungur at dansa við. Hetta var í øllum førum tað, sum vit aftur fingu burtur úr útvarpsfrásøgnini gjáramorgunin – mesta tíðin var jú farin at bíða eftir Sambandsflokkinum.

UM hendingarnar seinastu dagarnar fáa nakrar avleiðingar fyri formannin í Sambandsflokkinum, er enn óvist. Skulu vit gita, so fær tað neyvan nakrar avleiðingar, hóast løgmaður av sínum eintingum hevur hótt við nývali og nærum boðað frá nývali uttan at Sambandsflokkurin visti av tí.

IKKI bara sambandsfólk hava mist álit á formanni floksins. Eisini limir í hinum flokkunum í nýggju samgonguni hava sett spurnartekin við trúvirði løgmans, men teir hava so valt at royna hetta, so vit sleppa undan vali í ótíð einaferð afturat

JAVNAÐARFLOKKURIN avgjørdi at siga samstarvið upp, og eigur at fara at reka ein ábyrgdarfullan andstøðupolitikk, samstundis sum flokkurin setir út í kortið ein nýggjan politikk á fleiri økjum og í heila tikið endurnýggjar seg sjálvan – bæði við fólki og politikki.

ANNARS ynskja vit Føroya fólki eydnu við nýggju samgonguni!

*Sosialurin*

# Ein borgarligur royndartúrur

Týsdagin skrivaðu sambandsflokkurin, fólkaflokkurin, sjálvstýrisflokkurin og verkamannafylkingin undir eitt borgarligt samgonguskjal, og ætlaða borgarliga samgongan eftir valið á sumri í 1994, sum tíbetur ikki gjørdist veruleiki tá, er nú vorðin veruleiki í einum nakað broyttum líki. Tveir av flokkunum, miðflokkurin og kristiligi fólkaflokkurin, eru skiftir út við tveir aðrar, sjálvstýrisflokkin og verkamannafylkingina.

At hetta er ein borgarlig samgonga skal als eingin ivi vera um, tí samgonguskjalið er so borgarligt og høgravent, sum tað nú einaferð letur seg gera. Men tað er eisini náttúrligt, at borgarligir flokkar skriva borgarlig samgonguskjøl, tað skuldu serliga sambandsflokkurin, fólkaflokkurin og sjálvstýrisflokkurin fegnast um, tí politikkur teirra er høgravendur. Men hvussu verkamannafylkingin hevur tað í hesum døgum, tað er ikki gott at vita, men fast takið teimum, nú teir hava selt sína sál fyri at halda fast um ein landsstýrismannasess.

Her fyri var Kristjan Magnussen frammi við, at vit í Føroyum saknaðu ein flokk longur úti til vinstru, enn javnaðarflokkurin er. Men mær tykir, at stavnamenninir í fylkingini eru farnir so langt til vinstru, at teir nú daga uppaftur høgrumegin. Tað er møguligt, at eitt val nú ikki er so heppið fyri Kristjan Magnussen, tí mátti alt gerast fyri at sleppa í eina samgongu, men ein landsstýrismannasessur hevur hóast alt ikki hægri prís enn eins egna trúvirði.

Nú vit tosa um landsstýrismannasessir, so haldi eg meg minnast, at tað var sera umráðandi fyri Óla Jacobsen og Kristjan Magnussen og tá eisini Ingeborg Vinther, at tey fingu vinnumál, tí júst í hesum málsøki skuldu tey nýggju arbeiðsplássini vinnast. Men teir hava Gud hjálpi mær eisini selt málsøkið, og skulu nú umsita almanna- og heilsumál. Við allari tí virðing, javnaðarflokkurin altíð hevur víst hesum málsøki, so er tað ein veruleiki, at sambært samgonguskjalið skulu stórar niðurskerjingar henda innan almenna



sektorin, so neyvan finnur verkamannafylkingin nýggj arbeiðsplass her.

Frá 1991 og fram til dagin í dag, har borgarligir flokkar hava sitið í samgongu, hevur tað eydnast javnaðarflokkinum at hildið tørn, so at høgrarákið ikki tók okkum av fótum. Men valið í 1994 gav ein borgarligan meiriluta á løgtingi, og líkt er til, at hesin borgarligi meiriluti nú er vaksin við umboðunum hjá verkamannafylkingini. So sæð út frá einum demokratiskum sjónarmiði, so er tað rætt, at vit fáa eina borgarliga samgongu, tí á tingi sita 22 borgarligir tingmenn og so vit 10 aðrir. Sjálvsagt er tað ein uggi, at tíðin, teir í mesta lagi fáa, er tvey ár.

Men hvussu gladir eiga sambandsmenn nú at vera? Hvat hevur flokkurin vunnið av sínum málum. Fyri okkum, sum nú standa á síðulinjuni, so er tað rættiliga nógv, sum bendir á, at fólkaflokkurin so eftirtrykkiliga hevur drigið sambandsflokkin eftir hárinum aftaná sær.

Samgonguskjalið er úr byrjan til enda ein orðing um rættan fólkaflokspolitikk, hóast teir rættiliga elegant ikki hava brúkt orðingar sum lønarlækking, men eftir úttalilsunum frá flokkinum í fjølmiðlunum var ikki nakað ivi um, at júst hetta eisini var ætlanin. Haraftrat hava fólkafloksmenn sett seg á maktina í Tinganesi, nú teir umsita bæði figgjarmál og fiskivinnumál. At so sambandið hevur trý umboð í Nesinum, tað hevur ikki tann stóra týdningin, tí eftir ólavsøku avgera landsstýrismenninir stórt sæð alt innan teirra øki. So stóri sigursharrin í hesum borgarliga leiki hevur so avgjørt verið fólkaflokkurin, og stóru tapararnir hava verið sambandið og verkamannafylkingin.

Løgmaður hevur havt trý stórmál, síðan hann gjørdist løgmaður. Tað fyrsta var, at hann skuldi syrgja fyri, at danir skuldu gjalda okkum 2,7 mia. kr. aftur av tí, sum bankabjargingarnar kostaðu. Hansara ókvalifiseraða samráðingarupplegg gjørdi, at samráðingarnevndin kom aftur ongul í reyv. Men honum so líkt, so eru tað allir aðrir, sum eiga skyldina fyri hesum Hyggja vit eftir, hvat stendur í samgonguskjalinum hesum viðvíkjandi, so stendur: "Spurningurin um uttanlandsskuldina má loysast í samráð við kreditorarnar, serliga donsku stjórnina." So her er løgmaður dragnaður.

Næsta stórmál løgmans er bygnaðarbroytingarnar hjá Finn Norman Christensen. Býtið av málsøkjunum gongur beint ímóti hesum uppskoti. Skúli og mentan liggja hjá tveimum landsstýrismonnum, arbeiðsmarknaðurin liggur saman við almanna- og heilsumálum, og so er talið av landsstýrismonnum 7 og ikki 6. Hetta er so ikki í tráð við uppskotið, men tað ber kanska til hóast alt við broytingum. Men fráboðaða sparingin innan almennu umsitingina kann neyvan føra ein meirkostnað upp á 11 mió. kr. við sær. So her er aftur líkt til, at løgmaður er hálaður upp á plass av fólkaflokkinum.

Triðja málið, sum lætt kundi fört nýval við sær, var málið um framtíðarstøðu Føroya. Javnaðarflokkurin setti fram eitt uppskot, sum, um tað var samtykt, hevði fört nýval við sær. Øll minnast vit, hvussu stóra orku undirvísingarmálaráðharrin legði í at verja sjónarmið løgmans, og hvussu ofta hesin sami segði, at hetta kundi ikki gerast við sambandsflokkinum í samgongu. Men hvat hendir so? Hyggja vit eftir samgonguskjalinum, so síggja vit, at á leið sama orðingin stendur har. "Samgongan er samd um, at hon kann kanna viðurskifti Føroya í ríkisfelagsskapinum" stórt sæð tað sama, sum uppskotið hjá Maritu Petersen innibar. So her er løgmaður aftur vendur 180 stig eftir boðum frá fyrst og fremst fólkaflokkinum og møguliga fólkafloksvonginum í sambandsflokkinum, sum í hesi samgongu hevur vunnið meira enn tann sambandski vongurin.

Nú segði løgmaður, at hóast hann í hálvavegna spælni hevði tikið okkum øll á bóli við hóttanini um nýval sunnumorgunin, so vóru tað úrslitini, sum taldu. Hetta var eitt hent amboð til at fáa ávísar tingmenn at skikka sær hampuliga. Ja, er tað ikki ótrúligt, at hetta hendir í Føroyum í 1996, har vit altíð hava virt demokratisku hugsjónina og annars hava lisið og hoyrt um, at slíkt bert hendir í totaliterum statum.

Til aðrar áhugaverdar partar av samgonguskjalinum venda vit aftur, men eg kann ikki lata vera við at endurtaka, at fólkaflokkurin og fóklkafloksvongurin í sambandinum veruliga hava dugað at telva í hesum leiki. Men heilt at útradera seg, sum løgmaður og verkamannfylkingina hava gjørt, tað var ein dýrur prísur at gjalda fyri at sita á taburettinum, so leingi sum tað varar.

Átti kanska at takka løgmanni fyri, at hann við minnirika sunnudegnum fekk beint seinasta ivan burtur hjá okkara fólki, um tað var rætt at fara úr samgonguni ella ikki. Sunnukvøldið høvdu øll javnaðarfólk frið við seg sjálvan.

**Jóannes Eidesgaard**